# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Tey søgdu, at eg hevði tapt og bóðu meg gevast. Men tað amerikanska fólkið missir ikki mótið og gevst ikki*

*(Hillary Clinton)*




*Hillary og Bill Clinton fegnast um valsigurin í Pennsylvania í nátt (Mynd: Polfoto)*

# Kyn og húðarlitur avgjørdu valið

**-Rákið hevur vent, segði Hillary Clinton, tá hon sum væntað vann uppstillingina í Pennsylvania**

- Summi vildu vera við, at eg hevði longu tapt, og tey bóðu meg gevast. Men tað amerikanska fólkið gevst ongantíð, og tey hava krav upp á ein forseta, sum heldur ikki gevst, segði ein sigurssæl Hillary Clinton, tá tað var greitt, at hon hevði vunnið á Barrack Obama í Pennsylvania.

Sigur hennara kom ikki óvart á nakran, tí allar meiningakanningar vístu, at hon fór at vinna. Spurningurin var bara, hvussu stórur sigurin bleiv, og sambært teimum seinastu tølunum fekk Hillary Clinton umnleið 55 prosent av atkvøðunum, og Barrack Obama fekk umleið 45 prosent.

Politiskir eygleiðarar vísa í hesum viðfangi á, at Obama hevur brúkt tvær ferðir meiri pengar til valstríðið í Pennsylvania enn Hillary Clinton. Hinvegin kann hann rósa sær av, at munurin teirra millum bleiv ikki tey 20 prosentstigini, sum kanningarnar fyri nøkrum vikum síðani bendu á.

Úrslitið í Pennsylvania fær ikki stórvegis ávirkan á ta samlaðu støðuna, tí Barrack Obama hevur framvegis væl fleiri valmenn enn Hillary Clinton. Men úrslitið hevur tann týdning, at Hillary Clinton nú fer at halda fram við valstríðnum. Hevði hon tapt í Pennsylvania, var hon ivaleyst givin.

### Kyn og húðalitur

Kanningar í Pennsylvania í gjár vístu, at tað vóru serliga kvinnurnar og teir hvítu menninir í arbeiðarastættini, sum tryggjaðu Hillary Clinton sigurin. Hesi, sum ofta verða umrødd sum Reagan-demokratar, styðja demokratarnar, tá tað snýr seeg um búskaparpolitkkk, men republikanararnar, tá tað snýr seg um trygdarpolitikk og moralskar spurningar.

Kanningarnar vístu eisini, at nógv teir flestu svørtu veljararnir settu kross við Barrack Obama. Í summum støðum fekk hann meiri enn 90 prosent av teimum svørtu atkvøðunum.

Ein kanning hjá sjónvarpinum CNN vísir, at tveir triðingar av teimum svørtu verljarunum fara ikki at atkvøða fyri Hillary Clinton, verður hon forsetavalevni hjá demokratunum. Sama kanning vísir, at bara helmingurin av veljarunum hjá Hillary Clinton eru til reiðar at atkvøða fyri Barrack Obama, verður hann valevni hjá demokratunum í heyst.

Næstu uppstillingarvalini verða í North Carolina og Indiana um fjúrtan dagar.

# Zimbabwe eigur at fáa samstarvsstjórn

Tað største blaðið í Zimbabwe mælir nú stjórnarflokkinum og andstøðuni til at skipa eina samstarvsstjórn

The Herald skrivar, at grannalondini hjá Zimbabwe eiga at fáa Robert Mugabe, forseta og Morgan Tsvangirai, andstøðuleiðara at semjast um at skipa eina samstarvs- og tillagingarstjórn, sum skal skipa fyri fríum og frælsum valum.

Orðini hjá blaðnum hava vakt ans, tí vanliga verður The Herald mett sum eitt blað, ið hevur gott samband við zimbabwiska stjórnarflokkin ZANU-PF. Eygleiðarar halda tí, at innihaldið kann vera ein fráboðan um, at tílík hugskot verða umrødd í flokkinum og stjórnini.

Samstundis veksur misnøgdin í fleiri av grannalondunum hjá Zimbabwe. Í gjár segði zambiska stjórnin, at Mugabe eigur at lurta eftir andstøðuni, og í Suðurafrika sigur ANC-leiðarin, Jakob Zuma, at afrikanskir leiðarar eiga at gera sína ávirkan galdandi.

## STUTT SAGT

### Maturin ov dýrur

Í altsamt fleiri og fleiri londum kæra fólk seg um, at matvørurnar eru vorðnar ov dýrar, og at tey hava ikki ráð at keypa sær mettuna um dagarnar. Í gjár gingu umleið 4.000 fólk mótmælisgongu í einum býi har eysturi í Afghanistan. Mótmælisgongan var tann fyrsta av sínum slagi í landinum, og mótmælisfólk settu seg á høvuðsvegin millum Jalalabad og høvuðsstaðin Kabul. Tey kravdu, at stjórnin skal leggja uppí, so hon kann stýra matvøruprísunum.

– Vit hava ikki ráð at keypa mat, segði ein av mótmælismonnunum við útlendsku tíðindafólkini. Hann og hini ilskaðust serliga inn á grannalandið Pakistan, sum gavst at selja Afghanistan hveiti fyri nøkrum mánaðum síðani.

### Bobby Fischer gravast uppaftur?



Ein genta, sum heldur uppá, at fyrrverandi talvsnillingurin Bobby Fischer var pápi hennara, fer møguliga at krevja, at lík hansara verður grivið uppaftur, so ein DNA-roynd kann takast av tí. Tað sigur filipinski løgfrøðingurin Marilyn Young, sum vil vera við, at Bobby Fischer var pápi dóttir hennara, sum eitur Jinky. Tær báðar møðgurnar halda eisini uppá, at hjúnabandið millum Bobby Fischer og konuna, Myoko Watai, var ólógligt, og at Jinky hevur krav upp á arv eftir pápan. Bobby Fischer er jarðaður í Íslandi.